## MRCC / TR

## Vaktgangandi starvsfólk til MRCC-Tórshavn

Eitt starv sum vaktgangandi á MRCC-Tórshavn (Maritime Rescue Co-ordination Centre) er leyst at søkja.

**Starvið inniber hesar uppgávur:**
- Skiftandi vaktir og ábyrgd av vaktini.
- Tilkallivakt.
- Móttaka fráboðanir og taka støðu til hjálparveitingar á føroyskum sjóøkið.
- Vanligt fyrifallandi arbeiði á vaktini, t.d. skráseta ymiskt í sambandi við tilbúgvingina

**Førleikakrøv:**
- Nautiska ella aðra viðkomandi útbúgving
- Duga at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum
- Kunnleika til teldur
- Fullgilt GMDSS prógv.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Starvsheitið er eftirlitsfólk.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og

Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er MRCC-Tórshavn.

**MRCC bjóðar:**
Eitt avbjóðandi starv, sum virkar undir altjóðareglum hjá IMO og føroyskum lógarverki.

Ískoytislæru um: Leiting og bjarging og hvussu farast skal fram.

**Persónligir eginleikar:**
Kunna arbeiða sjálvstøvugt. Vera fyrikomandi og duga at samstarva við allar partar í tilbúgvingini her á landi og í útlandinum.

**Meira fæst at vita:**
Um starvið við at venda sær til MRCC- Tórshavn, Robert J. Olsen, tlf. 351302, far.tlf. 231311 ella teldupost manager@mrcc.fo

**Umsóknir:**
Saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða MRCC-Tórshavn, Tinghúsvegur 64, Postrúm 1120, 110 Tórshavn í hendi áðrenn mánadagin 04. mai 2009 kl. 14.00.

## Barnaverndartænastan

fyri: Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur

## Avloysari fyri leiðara til Barnaverndartænastuna

### Fyri Sørvágs-, Vága-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunu

Lýst verður eftir avloysara fyri leiðaran á Barnaverndartænastuni. Talan er um eitt farloyvisstarv fram til 31. oktobur mai 2009, ið verður lýst til setan 1. mai 2009 ella sum skjótast hereftir.

Barnaverndartænastan heldur til á skrivstovuni hjá Vága kommunu í Sandavági, nakað av ferðing má roknast í starvinum.

Arbeiðsøki er Sørvágs-, Vága-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur umframt Tórshavn.

**Uppgávur og avbjóðingar:**
- leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Barnaverndartænastuni
- leiðarin hevur ábyrgdina av at Barnaverndartænastan er ein vælvirkandi tænastudepil
- leiðarin hevur ábyrgdina av at tryggja eitt vælvirkandi tvørfakligt samstarv við tey fakfólk í økinum, ið vara av børnum og ungum
- málsviðgerð av Barnaverndarmálum
- umsiting av børnum við serligum tørvi, sbrt. § 5 í dagstovnalógini

**Førleikakrøv:**
- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- kunnleika til sosiala økið, kommunal viðurskifti og fyrisitingarrætt
- leiðsluroyndir ein fyrimunur
- góð samstarvsevni

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður lønt í samsvari við fakligan førleika og royndir.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Barnaverndartænastuna, Postrúm 19, 360 Sandavágur skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi 20. apríl 2009 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóngerð Nielsen, virkandi leiðara, tlf. 213960 ella Karl A. Olsen, formann í samstarvsnevndini, tlf. 770107.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum, um ikki nóg nøgvar umsóknir eru til starvið.

Hammershaimbsvegur 1 • Postrúm 19 • 360 Sandavágur
Tlf. 333 960 • Fartlf. 213 960 • E-mail bvt@sandavagur.fo

## Vágs skúli

## Lærarastørv í Vágs-skúla

### lýst leys til setanar frá 1. august 2009

- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv við fullum tímatali skúlaárið 2009/2010 vegna farloyvi, lækkað tímatal og serligan tørv.
- 1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2009/2010 vegna lækkað tímatal og avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett 1.sept. 2009

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi onsdagin 29. apríl kl 10.00

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 733030

Vágs skúli hevur komandi skúlaár umleið 223 næmingar í 12 flokkum og 24 lærarar.

**Vágs skúli**
Vágsvegur 32
900 Vágur




